FISKIMÁLARÁÐIÐ

Sp/f Lilja M
Traðarbrekka 2

380 Sørvágur

Fiskivinnustovan
26.03.2021
Fiskiloyvi nr. 61662

Kvotaskjal

Hjálagt sendir Fiskimálaráðið fiskiloyvi:

**Hummari - royndarveiða á djúpum vatni sunnan fyri Vágoynna**

Ministry of Fisheries
Heykavegur 6A • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Fiskivinnustovan
26.03.2021
Fiskiloyvi nr. 61662
Kvotaskjal

# Royndarloyvi

## Hummari - royndarveiða á djúpum vatni sunnan fyri Vágoynna

Avrit

| | |
|---|---|
| **Eigari:** | Sp/f Lilja M |
| **Skip:** | LILJA M |
| **Kallimerki:** | XPF4241 |
| **Havnakenningarmerki:** | VA 63 |
| Gildistíð: | Frá: 26.03.2021 |
| | Til: 31.12.2021 |

Hetta royndarloyvið er latið samsvarandi ásetingum í § 50 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi, við møguligum seinni broytingum.
Loyvið heimilar royndarveiðu og áleggur skyldur og treytir, sum ásett í loyvinum.

| | | |
|---|---|---|
| **Veiðirættindi:** | Fiskaslag | Hummari |
| | Royndarveiða: | 160 rúsur |
| | Fiskileið: | Innanfyri 12 fjórðingar |
| | Viðmerking: | Royndarøkið er avmarkað á korti. |

**Reiðskapur:** Teinar/rúsur

**Treytir**

1) Royndirnar skulu bert fevna um beinleiðis veiðu eftir hummara við rúsum. Hjáveiða av botnfiski er ikki loyvd. Royndirnar skulu steðga á leiðum har hjáveiða er.

2) Hægst loyvda tal av rúsum á hvørjum strekki er 50, og skulu 12 favnar vera ímillum hvørja rúsu. Hvørt strekki skal hava endaboyur.

3) Endaboyurnar skulu hava stong, sum skal vera 150 cm høg oman fyri sjógvin og skal vera merkt við fløggum, ið síggjast væl . Eitt flagg skal vera á norðaru endaboyu og tvey fløgg á sunnaru endaboyu. Fløggini skulu ikki vera minni enn 21 x 30 cm. Endaboyurnar skulu vera merktar við sjónskum bátsnummari og strekkinummari.

4) Hvør hummararúsa má ikki vera størri í rúmmáli enn 80 litrar.

5) Loyvt er at hava í mesta lagi 160 rúsur standandi í sjónum í senn.

6) Tað er strangliga bannað at seta omanyvir annan reiðskap.

7) Tað er bert loyvt at røkta t.v.s. seta ella at draga hummararúsurnar í dagslýsi. Gamalt ella brúkt agn má ikki kastast útaftur á veiðiøkið.

8) Bátar við fiskiloyvi eftir hummara hava bert loyvi at royna annanhvønn dag.

9) Tað er bert loyvt at avreiða veiðuna um eina góðkenda innvigingarskipan í Føroyum, og í útlandinum um eina innvigingarskipan, sum Fiskiveiðueftirlitið hevur góðkent.

10) Fólk frá Havstovuni skal kunna vera við bátinum.

11) Førd verður serlig dagbók viðvíkjandi royndunum. Í dagbókini skulu dagfesting, knattstøður, veiða hvørt strekki, tal av rúsum hvørt strekki førast talgilt ella á pappír. Áðrenn royndarveiðan byrjar, skal dagbókin sum skal nýtast vera góðkend av Havstovuni. Eftir at royndarveiðan er enda skal dagbókin sendast Havstovuni.

12) Skrivlig frágreiðing um royndirnar skal latast Fiskimálaráðnum og Havstovuni, tá royndartíðin er av, og áðrenn møguligt nýtt royndarloyvi verður útskrivað.

13) Royndarfiskiskapurin skal ikki vera øðrum fiskiskapi til ampa.

Royndarloyvið kann verða inndrigið uttan ávaring, um treytirnar í hesum loyvi ikki verða fylgdar.

Ministry of Fisheries
Heykavegur 6A • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo